## Danmark hølvaði Liktinstein av

Danmark hevur framvegis møguleika at sleppa til EM-endaspælið 2008. Eftir at teir fingu eitt sting burturúr í Svøríki leygardagin, megnaðu teir í dag at vinna øll trý stigini. Annað enn tað hevði tó verið ónøktandi, tí mótstøðuliðið var Liktinstein. Teir vórðu sendir heimaftur við einum 0-4 tapi í viðførinum. Stóra hjálp fekk danska liðið frá Íslandi, sum í kvøld vunnu 2-1 á Norðurírlandi. Hetta hevur við sær, at danir nú bara eru tvey stig frá Norðurírlandi, og fimm stig frá at røkka endaspælinum. Liðini hava fýra dystir eftir at spæla. Hetta undantikið Norðurírlandi og Íslandi, sum hava spælt ein dyst fleiri.



## Skotar vunnu í Fraklandi

Franska landsliðið kann helst fara til skotvenjingar saman við okkara monnum, eftir at teir á heimavølli máttu lúta fyri Skotlandi. Einsamalla málið í dystinum skeyt James McFadden við kanónskoti úr 25 metra frástøðu, men í allar aðrar mátar sat heimaliðið á øllum. Við einum stórspælandi Craig Gordon í málinum fingu skotar tó var fyri øllum, og so kundu fronsku stjørnurnar bara iðra seg um at tað, sum kundi og skuldi verið trý stig, ístaðin gjørdist til kaldur lúsingur.

Litava-Føroyar 2-1 (1-0):

# Helvtin riggaði

**Tað eydnaðist til fulnar at tvinga litavisku spælararnar til eisini at hugsa verjufótbólt. Men tað riggaði í alt ov lítlan mun at gera sær dælt av teimum møguleikum, sum føroyska liðið skapti sær í Kaunas**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann hevur gjørt tað fyrr, og hann gjørdi tað so aftur hesaferð. Rógvi Jacobsen er framvegis einasti føroyski landsliðsspælarin, sum hevur skorað í hesi undankappingini, og við einum framúrskarandi lobbi úr 20 metrum hitaði hann føroysku hjørtuni nakað, tá náttarkuldin spakuliga hevði lagt seg yvir Kaunas.

Fyri føroyska liðið og úrtøkuna av dystinum var trupulleikin bara, at hetta var at kalla seinasta sparkið í dystinum, sum tí kortini varð taptur. Og tað kundu okkara sum so ikki vera nøgdir um.

### Helvtin riggaði

Landsliðsvenjarin hevði undan dystinum sagt upp í saman, at tað ráddi um hjá føroyska liðnum at vera væl skipaðir í verjustøðu, og at vit so skuldu tora at spæla í álopsstøðu.

Og av hesum riggaði í øllum førum helvtin. Tí tað tók sína tíð, áðrenn liðið veruliga stóð rætt á vøllinum. Á vinstra bakki byrjaði Jákup á Borg ikki so sannførandi, nú hann fyri fyrstu ferð yvir høvur royndi seg á hesum plássinum. Og nakrar ferðir varð hann yvirspældur í kvikum 1-2 samanspælið, tá hann fór upp at pressa, heldur enn bert at gardera í verjupartinum. Og við undantaki av Fróða Benjaminsen, so tóktist nýggja samansetingin at



*Skothagtøini søgdu, at litavar høvdu 23 av slagnum mótvegis 7 frá okkara monnum. Men bert trý av skotunum hjá vertunum vóru innan fyri rammuna, og tað var eitt minni enn hjá føroyingunum. Ein góð mynd av, at hóast yvirvágina, so megnaðu vertirnir sjáldan at spæla seg fram til tær heilt vandamiklu støðurnar*